Tórshavn – juli 2024

# VÆLKOMIN Á SØGU- OG SAMFELAGSDEILDINA (SSD) Á FRÓÐSKAPARSETRINUM

Góði lesandi.

Vit vilja fegin ynskja tær hjartaliga vælkomin á Søgu- og samfelagsdeildina. Vit vóna, at tú fert at trívast og at verða ein virkin luttakari í virkseminum, sum fer fram her í húsinum í Jónas Broncksgøtu. Vit fara at gera okkara ítasta fyri at fáa teg at kenna teg "heima" á deildini.

Vit senda tær her við stutta kunning í sambandi við lestrarbyrjanina.

Lestrarárið byrjar mánadagin 19. august, kl. 9.00, í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum við felags innleiðslu fyri øll nýggj lesandi á Fróðskaparsetrinum. Klokkan 11.15 heldur innleiðslan fram á Søgu- og samfelagsdeildini. Vika 34 er innleiðsluvika, tvs. at vanliga undirvísingin byrjar í viku 35, mánadagin 26. august.

Tað er av stórum týdningi, at tú ert við til innleiðsluna, soleiðis at tú fært upplýsingarnar, tær tørvar – um skeið og útbúgvingar, mannagongdir og reglugerðir, kunningar- og samskiftispallar, starvsfólk og lestrarvegleiðing, osfr. Haraftrat er innleiðslan eyðsæð eitt gott høvi at heilsa uppá tey fólk, tú fert at lesa saman við tey komandi árini. Tú fært eisini møguleikan at tosa við starvsfólk, sum kunnu royna at svara tínum spurningum um lestrarviðurskifti.

*Kunning um pensumbøkur, sum tit skulu útvega tykkum innan lestrarbyrjan, síggja tit í viðhefta bókmentalista. Skrivliga tilfarið er á føroyskum, enskum og donskum/skandinaviskum máli.*

Um tú hevur spurningar ella viðmerkingar til okkum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við lestrarskrivstovuna LSS@setur.fo, ella við útbúgvingarleiðaran, Ragnheiður Bogadóttir, á ragnheidurb@setur.fo tlf. 292579

Vit gleða okkum til at síggja teg.

Vinaliga

Erika A Hayfield
Dekanur, Søgu- og samfelagsdeildin

Runa Preeti Ísfeld
Útbúgvingarleiðari, Samfelagsvísindi

## Bókmentalisti

Bøkurnar eru bílagdar í Rit og Rák

Bøkur, sum tit skulu útvega tykkum innan undirvísingin byrjar, eru hesar:

**Sosiologi:**

Macionis, J.J. & Plummer, K. 2012. Sociologi – A Global Introduction (5.útg.)
Harlow: Pearson.

**Grundskeið í stjórnmálafrøði:**

Heywood, Andrew (2019) Politics (5. útg.) A Macmillan International Higher Education. Red Globe Press, UK.

**Vísindaástøði og háttalag**

Jacobsen, Michael Hviid, Lippert-Rasmussen, Kasper, and Nedergaard, Peter (2015), Videnskabsteori (3. útg.), Hans Reitzels Forlag.

# Skrá fyri innleiðsluna á Søgu- og samfelagsdeildini 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| Kl. 09.00 | Skráseting |
| Kl. 09.15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| Kl. 09.30 | Tónleikur |
| Kl. 09.45 | Stutt røða |
| Kl 10.00 | Lesandi fáa høvi at vitja básar. (Studni, Betri Banki, Landsbókasavnið, Rit og Rák, Ráð Teirra Lesandi, MFS og onnur verða boðin við) |

*Lesandi fara út á deildirnar.*

| | |
|---|---|
| **Kl. 11.00** | **Lesandi fara til SSD í Jónas Broncksgøtu 25, mentorar verða til hjálpar at vísa veg** |
| Kl. 11.15 | Dekanurin bjóðar stutt vælkomin og felags myndatøka. |
| Kl. 12.00 | Lesandi fara hvør við sínum útbúgvingarleiðara inn í undirvísingarhølini og bjóða vit eina lætta máltíð. Her fáa lesandi høvi til at heilsa uppá hvønn annan, útbúgvingarleiðaran og onnur, ið hava eitt serligt tilknýti til útbúgvingina. Útbúgvingarleiðarin kunnar um útbúgvingina, umframt krøv og væntanir til tann lesandi. Hetta er eisini ein góð løta at tosa saman og spyrja um møgulig ivamál.<br><br>Eisini verður rundsýning í bygninginum og høvi at heilsa uppá starvsfólk. |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

**Mikudagin 21. august**

Dagur saman við mentorum. Útferð til Nólsoyar. Møtast á Bursatanga kl. 9.15
Báturin siglir úr Havnini kl. 9.30, og vit sigla úr Nólsoy aftur kl. 13.00

Havið matpakka við.

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 17.00-20.00 | Felags døgurði í Jónas Broncksgøtu, har vit hugna okkum saman, áðrenn farið verður til SetursSamanShow. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |